Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Týningarevni í matvørum í Føroyum

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við týningarevnum í matvørum í føroyskum handlum?
2. Er týningarevnið Chlorpyrifos, sum er bannað í ES og Danmark, loyvt at brúka í Føroyum?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at gera reglur fyri, hvørji týningarevni kunnu brúkast, og hvørji ikki kunnu brúkast í Føroyum?

Viðmerkingar:
Í farna mánað kom fram gjøgnum Heilsufrøðiligu starvsstovuna (HFS), at týningarevnið Chlorpyrifos var funnið í eini vøru, sum er seld í føroyskum handlum. Fleiri kanningar vísa, at sjálvt í smáum mongdum er Chlorpyrifos skaðiligt fyri heilan hjá børnum. Um so er, at børn eru í heilsuvanda, so kann vera neyðugt at styrkja eftirlitið við slíkum vørum. Talan er um vørur, sum eru innfluttar úr Danmark, og tað eru kanningar hjá DTU Fødevareinstituttet í Danmark, sum hava funnið týningarevnið í vøruni.

Í hesum sambandi er viðkomandi at spyrja, hvør leikluturin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er, og í hvønn mun HFS hevur eftirlit við slíkum evnum. Harumframt eru tíverri ongar ásetingar í føroyskari lóggávu um nýtslu av týningarevnum sambært heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Grannalond okkara hava reglur fyri, hvørji týningarevni kunnu brúkast, og hvørji ikki kunnu brúkast. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 7. desember 2021

Djóni Nolsøe Joensen